## Pensjónistar fáa ókeypis koppseting ímóti influensa

Nú kunnu øll, sum hava fylt 67 ár, verða koppsett ókeypis ímóti influensa. Hans Paula Strøm, landsstýrismaður heldur, at henda nýggja ásetingin er eitt gott tilboð til allar pensjónistar í Føroyum. Áðrenn hesa broytingina skuldu pensjónistarnir sjálvir gjalda, um teir ynsktu at koppseta seg móti influensa. Nú skulu teir pensjónistar, sum ynskja eina koppseting, bara venda sær til ein kommunulækna. Pensjónistarnir nýtast ikki at hugsa um at fara á Apotekið, fyri at keypa koppingarevnið, tí Almanna- og heilsumálaráðið hevur gjørt avtalu við kommunulæknarnar um, at teir hava koppingarevnið liggjandi.



## Byrja at bora mikudagin

Vánaliga veðrið seinastu dagarnar hevur tarnað arbeiðinum at gera klárt til boringina á Williamleiðini. Hjarnar Djurhuus, stjóri hjá BP sigur við Sosialin, at teir nú bíða eftir betri veðri at fáa tað seinasta upp á pláss. Sum tað sær út í løtuni verður helst hol sett á undirgrundina mikudagin 17. oktober

# Fimm tímar til Suðuroyar

**Ferjan St. Ola er avloysaraskip at sigla millum Suðuroy og Havn. Men tað er ikki sørt at suðuroyingum leingist eftir Smyrli. – Vit vilja ikki vita av hesum skramblikassanum, siga tey avgjørd.**

SAMFERÐSLA
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*




*St. Ola siglir alt tað hon kann, men megnar kortini ikki at halda ferðaætlanina*

**Suðuroy:** Fríggjakvøldið fóru ferðafólkini umborð á St. Ola kl. 18:30 – men sluppu ikki í land aftur fyrrenn klokkan var farin at nærkast hálvgum tólv.

So langa tíð til Suðuroyar er meiri, enn hvat tey flestu munnu ynskja sær, og tí eru suðuroyingar alt annað enn nøgdir við loysnina, sum Strandferðslan hevur veitt teimum.

- Tað er lítil meining í, at vit skulu sita fimm tímar umborð á ferjuni. Serliga tí, at hetta er dupult so long tíð sum upprunaliga ætlað og lovað, siga suðuroyingar.

Fýlst verður haraftrat á ferðaætlanina, sum als ikki heldur – og sum í roynd og veru hevur blakað teir aftur í 80'ini.

Sambært hesi, skal St. Ola avstað aftur av Krambatanga tríggjar tímar seinni. Hetta vil aftur siga, at ferðafólk, bilar og farmur skulu í land og umborð uppá bert 20 minuttir.

Men sum skilst hevur tað bert verið undantaksvís, at ferðaætlanin hevur hildið.

### Sterkt beklagiligt

Eftir røttum skal St. Ola brúka 2 tímar og 40 minuttir um ferðina, men hesa seinastu tíðina hevur ferðin tikið minst hálvan tíma longur.

Orsøkin til hetta er, sambært stjóranum á Strandferðsluni, Regin Vágadal, at ein av turbinunum umborð gekk fyri.

Hann skilur væl, at suðuroyingar ikki eru serliga fegnir um sambandið. Hann biður tey bara geva tol, tí Smyril verður skjótur aftur.

- Eftir røttum burdi ferðaætlanin hildið, hóast hon er nakað stramm, sigur stjórin. At ein av maskinunum gongur fyri, er ikki nakað sum Strandferðslan kann lastast fyri.

Tað byrjaði annars væl við St. Ola, men nakað seinni fekk hon maskinskaða í ta einu av teimum fýra maskinunum umborð.

Teir høvdu eina eyka turbinu við sær umborð, men tá teir skuldu gera klárt at seta hesa til ístaðin fyri ta brotnu, vísti tað seg at hon ikki passaði til.

- Tí er støðan soleiðis sum hon er, og tað er bara keðiligt, ja, sterkt beklagiligt, sigur Vágadal í stuttari viðmerking.

Hann leggur tó aftrat, at suðringar skulu ikki bíða leingi aftrat, tí Smyril er væntandi til Føroyar aftur seinast í hesum mánaðinum.

# Vinnudagurin verður 9. november

**Evnið hesaferð verður organisatión, sum verður lýst á ymiskan hátt**

VINNUDAGUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Vinnudagurin 2007 er tann áttandi í røðini. Evnið í ár verður organisatión. Hetta er eitt sera breitt hugtak, og tí fara fyrilestrahaldararnir at viðgera tað frá sera ymiskum sjónarhornum.

Vinnuhúsið skrivar á heimasíðuni, at Mette Bloch fer at halda fyrilestur undir heitinum "Tør du blive en vinder?" Hon fer her at taka upp spurningin um, hvat skal til fyri, at ein organisatión og ein fyritøka gerast vinnarar. Mette Bloch er m. a. tvífaldur heimsmeistari í rógving og arbeiðir nú sum fyrilestrahaldari, rithøvundur og greinaskrivari.

Kenneth Iversen er stjóri á Unimerco. Henda fyritøka er kend fyri eina sera flata organisatión, og at bygningarnir fyritøkan húsast í eru bygdir til tess at fremja hesa. Unimerco var í 2006 kosin besta arbeiðspláss í Danmark. Kenneth Iversen heldur fyrilestur undir heitinum "Den landbaserede kuttermodel".

"Fremtidens organisationsformer". Hetta er heitið á fyrilestrinum hjá Klaus Æ. Mogensen, sum er framtíðargranskari á Institut for Fremtidsforskning. Hann hevur saman við øðrum skrivað bókina Creative Man, sum snýr seg um, hvussu og hví kreativitetur og nýhugsan verða alt størri partur av øllum liðum í samfelagnum, eisini í fyritøkuni.




*Eirikur á Húsamørk, stjóri á Høvdavirkinum í Leivík og Jóhan Páll Joensen, formaður í arbeiðsgevarafelagnum. Á vinnudegnum fyri tveimum árum síðani gjørdist Høvdavirkið ársins virki*

*Mynd: Eirikur Lindenskov*

Marin Vang, sjúkrarøktarstjóri á Landssjúkrahúsinum, fer at tosa um samstarv sum eitt týdningarmikið lið í organisatiónini, og hvørja ávirkan okkara lítla samfelag mangan hevur á samstarvið. Hennara fyrilestur hevur heitið "Hugleiðingar um samstarv".

http://www.industry.fo/ew/media/Arsins%20virki/Skr%E1%20fyri%20Vinnudagin.pdf

Skráin leggur sostatt upp til ein spennandi dag við mennandi fyrilestum og íblástri til gerandisdagin.

Inntil 25. oktober ber bert til hjá limum í Føroya Arbeiðsgevarafelag at melda seg til Vinnudagin 2007. Eftir hetta ber til hjá øllum at melda til. Tilmeldingarfreistin er 5. november.

# Hovstunnilin letur upp í næstu viku

Leygardagin 27. oktober verður Hovstunnilin tikin alment í nýtslu. Í hesum sambandi fer Landsverk at skipa fyri almennum hátíðarhaldi og veitslu um kvøldið fyri innbodnum.

Nú er komið so mikið væl áleiðis, at allar neyðugar installatiónir og trygdarútgerð innan eru lidnar. Tunnilin er ikki handaður Landsverki enn, men gjøgnumgongd hevur verið, og tað sum nú manglar, er ikki alneyðugt at fáa liðugt, áðrenn tunnilin verður tikin í nýtslu.

Síðani skal ein tilbúgvingarvenjing haldast og tunnilin endaliga myndugleikagóðkennast, áðrenn hann kann latast upp fyri almennari ferðslu.

Allar súðir eru tó ikki syftar enn. Sum kunnugt skal portalurin Øravíkarmegin, t.e. tunnilsmunnin, leingjast.

- Av tí at bíðitíðin frá tí, at tú bíleggur elementir, til tey eru móttikin, er so long, hava vit tikið avgerð um at bíða við hesum arbeiði til næsta summar, verður sagt av Landsverki.

Sjálvt arbeiðið at leingja portalin fer tá at taka umleið sjey vikur, harav tunnilin verður stongdur í umleið tvær vikur.

Sum byggiharri í hesi spennandi verkætlan, eru tey hjá Landsverki væl nøgd við samlaða úrslitið, nú tað fyriliggur. Hovstunnilin er ein fyrsta floks tunnil, sum øll væntandi fáa stóra gleði av.